## DAGSINS MEINING

# Føroyskur trygdarpolitikkur - ein táta

Í umleið fimti ár var føroyskur trygdarpolitikkur mest sum eitt tabuevni í føroyskum politikki. Verður sæð burtur frá afturvendandi roki um støðirnar á Sornfelli og á Eiði, hevur ikki verið nakað beinleiðis trygdarpolitiskt orðaskifti í Føroyum fyrr enn í ár. Sum flestøllum kunnugt lýsti Løgtingið í 1940 Føroyar sum uttanveltaðar. Við støði í hesi yvirlýsing hevur fleiri ferðir verið samtykt, at Føroyar skuldu vera uttan fyri hernaðarligar trætur millum stórveldi. Hetta var ivaleyst skilagóður politikkur og henda støða Løgtingsins elvdi til virðing uttanlanda hjá teimum, sum sóu vandan við kalda krígnum.

Men so endaði kalda kríggið og onnur tann stóra hernaðarsamgongan Warzawasamgongan fór í søguna. NATO broyttist frá at vera ein verjusamgonga vend ímóti Sovjetsamveldinum og gjørdist til eitt slag av heimsins politisti undir leiðslu av USA. Fyrrverandi Warzawa samgongulimir komu upp í NATO og einki var sum fyrr. Fullveldissamgongan fór at tala um føroyskan NATO limaskap og málið alt varð knappliga umgyrt av einum heilt nýggjum opinleika og NATO gjørdist knappliga akseptabult hjá nøkrum av teimum vinstrahallu, sum mestsum høvdu livað av at finnast at NATO! Vit vita lítið um, hvat føroyingar halda um hesa nýggju gongdina. Føroyingar hava altíð verið skeptiskir til hernaðarmál. Hetta hevur sínar søguligu orsøkir. Men nú hava so løgting og landsstýrið hálsað um og vilja sleppa at vera við, vilja takast uppá ráð, tá ið teir stóru leggja sínar hernaðarætlanir fyri framtíðina. Tað man vera ein stórur spurningur, hvussu stóra ávirkan Føroyar fáa á politikkin hjá NATO. Tað stendur á hjá stórveldum sum Fraklandi og Týsklandi at gera seg galdandi. Í NATO ráða USA og Bretland at kalla einsamøll. So er spurningurin, um okkara trygdarpolitikkur er annað enn ein táta. Fáa vit nakra veruliga ávirkan á trygdarpolitikkin um okkara leiðir? Tað vil tíðin vísa.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fer at hitta aðalskrivaran í NATO, Jaap de Hoop Scheffer. Fundurin verður eftir ætlan á NATO-høvuðsborgini í Brússel tann 12. apríl. Fundurin millum løgmann og NATO-aðalskrivaran er komin í lag í sambandi við at løgmaður vitjar í Evropasamveldinum í døgunum 10. til 13. apríl. Er hetta skilagott? munnu mong spyrja. Er hetta ikki bert eitt ritual? Hvat fær løgmaður burtur? Tað er eingin ivi um, at tað er bæði rætt, skilagott og neyðugt at vitja ES. Vónandi eydnast tað løgmanni at bróta ísin bæði úti og heima við vitjan síni á ES høvuðsborgini. Men NATO? Vit loyva okkum at ivast eitt sindur. Vit halda eisini, at tað kanska er í so tíðiliga, at ein javnaðarløgmaður vitjar NATO, tá hugsað verður um, hvat Svartabók og Reyðabók hava avdúkað. Kanska skuldi løgmaður latið eitt sindur av tíð gingið, latið hetta sodna eitt sindur. NATO hevur broytt politikk og kós, men ivasamt er, um NATO er vorðið stovureinari fyri tí. Demokratiið í NATO kann enn sum áður liggja á einum lítlum plássi. Tað hava hendingarnar seinastu árini tíverri avdúkað. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tvørfakligt samstarv heldur enn faktvørligan sjálvdrátt

**Viðmerking til meining hjá Annemi Joensen í Dimmalætting 4. apríl 2005**

**Majbritt Mohr**
*forkvinna í Almanna- og heilsurøktarafelagnum*

At tørvur er á øllum starvsbólkunum í føroyska heilsuverkinum er púra vist. Annað er so, at okkara framúr góðu og royndu sjúkrahjálparar, sum hava lært heilsuatstøðingar og sjúkrarøktarfrøðingar nógv, nú eru við at verða avloystir av heilsuatstøðingum. Men sjúkrahjálparar hava ongantíð trýst nakran sjúkrarøktarfrøðing úr nøkrum starvi. Tað er heldur ikki tað, ið heilsuatstøðingarnir ynskja. Men okkara útbúgving er sum kunnugt fakliga góð og breið, og tí kunnu vit brúkast í breiðari høpi enn sjúkrahjálpararnir kundu.

At læra til heilsuatstøðing tekur 2 ár og 10 mánaðir. Undir útbúgvingini lærir tú millum mangt annað at taka tær av heilsu- og sjúkrarøktaruppgávum til likamliga sjúk og sálarsjúk. Ítrivsvegleiðing er eisini partur av útbúgvingini. Útbúgvin kanst tú arbeiða nógvastaðni í almanna- og heilsuverkinum; nevnast kunnu sjúkrahús, sálardeildir, ellis- og røktarheim, heimarøkt, tilhald og sambýli fyri eldri, sálarsjúk og evnaveik.

Fakliga góða og breiða útbúgvingin til heilsuatstøðing ger, at tað nú er neyðugt at endurskoða samansetingini og tørvin á starvsfólkabólkum nógvastaðni í almanna- og heilsuverkinum. Eg haldi ikki, at tað er rætt at siga, at ein bólkur eigur ávís størv av søguligum orsøkum. Men ein ávísur bólkur kann vera betur skikkaður at røkja ávís størv, og eg haldi, at munur er á hesum báðum hugtøkunum. Sjúkrarøktarfrøðingar starvast har, ið teirra útbúgving er kravd, men teir starvast eisini nógvastaðni, har ið teirra førleiki ikki neyðturviliga er kravdur. Á nógvum arbeiðsplássum er okkara førleiki hóskandi, og aðrastaðni er fakliga skilabest, at fleiri starvsbólkar samstarva. Hetta prógva drúgvar royndir aðrastaðni; til dømis í øðrum norðurlondum.

Tað eigur at vera felags fyri øll røktarstarvsfólk, at vit arbeiða miðvíst fyri einum góðum og vælvirkandi almanna- og heilsuverki, har ið allir brúkarar kunnu fáa røttu og bestu viðgerðina og ta bestu røktina. Hetta gerst best við tvørfakligum samstarvi, har ið vit øll hava okkara týdningarmikla leiklut. Til dømis eru heilsuatstøðingar í Danmørk við í alskyns verkætlanum, eins og tær assistera við skurðviðgerðir. Og væl útbúnir heilsuatstøðingar í øðrum londum eru leiðarar – eisini hjá sjúkrarøktarfrøðingum.

Tá ið Annemi Joensen í lesarabrævi sínum stúrir fyri, at heilsuatstøðingar fara at ganga arbeiðsleysir í Suðuroy, má eg svara, at eg haldi hetta uppáhald vera merkt av svartskygni. Okkara fakbólkur kann jú, sum eg áður havi nevnt, starvast nógva aðrastaðni enn á ellis- og røktarheimum. Og sjúkrahús er sum kunnugt eisini í Suðuroy, eins og heimarøkt og sambýli, ið eisini eru uppløgd starvsøki. Harumframt eigur økispsykiatri eisini at vera í Suðuroy, so at byrgjast kann fyri, at sálarsjúk í oynni noyðast at lata seg leggja inn á sálardeild í Tórshavn, hóast tað ikki er neyðugt. Tilhald og verkstøð til eldri fólk ella aðrar samfelagsbólkar, ið á einhvønn hátt hava tørv á aktivering ella stuðli, hava eisini størv, ið heilsuatstøðingarnir hava førleika at røkja.

Orsøkin til at heilsuskúlin á Tvøroyri fer at útbúgva heilsuatstøðingar er tískil ikki, at summi spáa, at trot fer at vera á sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum. Nei, tað er ein ásannan av, at heilsuatstøðingar fara at vanta í í tvørfakliga samstarvinum, um skúlin ikki fer at útbúgva heilsuatstøðingar. Somuleiðis átti Annemi Joensen at vitað, at útbúgvingin til heilsuatstøðing eisini er komin í staðin fyri millum annað útbúgvingina til pleygara. Verður útbúgvingin av ongum, fer starvsfólkatrot skjótt at tyngja sálardeildirnar í Tórshavn.

# Føroyskur næstrakærleiki til ófødda barnið

**Jógvan Poulsen**

Øllum føroyingum verður send ein tøkk fyri næstrakærleikan til óføddu børnini.

Í grein 7. apríl 2005 í Dimmalætting skrivar George L. Petersen um 4 av 23 kvinnum, ið eru skelkaðar av, at fosturtøka ikki er frí í Føroyum. Eg má viðmerkja, at eg eri skelkaður av, at menniskju kunnu vera so ómenniskjalig, at tey vilja døma hesi smáu, verjuleysu menniskju til deyðis.

Minstakrav fyri deyðadómi má verða ein rættvís rættargongd, og at allir partar verða hoyrdir í málinum.

Kvinnurnar vísa á, at fólk í Danmark kundu komið hvørjum øðrum meiri við, og at sami nærleiki ikki er har, eins og hann er í Føroyum. Ein av orsøkunum til hetta kundi verið, at í Føroyum virða vit framvegis mannalív.

Mín fatan er, at Halgabók hevur givið føroyingum hesa virðing fyri mannalívi. Tey lívsvirði, ið Bíblian boðar, eru enn í dag verd at halda høgt og at byggja lív og land okkara á.

Eg vóni ikki, at føroysk fakfeløg skulu verða nýtt til at taka grundarlagið undan samfelagi okkara, og hereftir at taka lívið av verjuleysum fostrum.

Eftir míni fatan avdúkar kjakið um fría fosturtøku endaleysa tómleikan í gudsavnoktan og evolutionslæru.

Føroyingum at takka er fosturtøka ikki frí í Føroyum. Saman eiga vit eisini at virka fyri, at talið av fosturtøku verður minkað í mest møguligan mun. Føroyska samfelagið er ikki nóg gott, fyrr enn øllum gitnum fostrum er tryggjað lív, framtíð og vón.

Orðið um Kristus er tað einasta, ið kann verja lív og samfelag okkara ímóti tí roti, sum treingir seg á, bæði innanífrá og uttan úr heimi. Tí vil eg heita á hvønn einstakan føroying um at granska Halgubók og at blíva persónliga frelstur.

P.S.: Ein av fyrstu døgunum fari eg at lima meg inn í felagið ProVita, ið ynskir at verja lív.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.